STARVSLÝSING

## Avloysarastarv á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni

Søkt verður eftir umhvørvisviðgera, til tíðaravmarkað starv, á umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Starvið umfatar yvirhøvur mál innan karmarnar av umhvørvisverndarlóggávuni, serliga innan viðgerð av umhvørvisgóðkenningum.

Hetta merkir, at tú í tí dagliga kemur at arbeiða við at:

- gera uppskot til umhvørvisgóðkenningar
- røkja umhvørviseftirlit
- gera umhvørvisfakligar metingar
- fylgja við í altjóða gongdini innan umhvørvisvernd.

Starvið er sera fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Skikkað til starvið eru tey, sum hava lokið prógv innan umhvørvistøkni, náttúruvísund, verkfrøði e.l.

Vit sóknast eftir einum fólki við áræði og framfýsni at náa settum málum, sum sær nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing, kann arbeiða sjálvstøðugt, dugur væl at samstarva, hevur kunnleika til edvskipanir og hevur góð evni til at samskifta við onnur, bæði í skrift og talu. Koyrikort til bil er ein treyt.

Starvið skal setast skjótast tilber, og er setanin tíðaravmarkað til 31. desember 2007. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

Umsóknir við avriti av prógvi, viðmælum, CV og tílíkum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 16. juli 2007.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóhonnu Olsen, virkandi deildarleiðara, tlf. 35 64 22, ella Bárð Enni, stjóra, tfl. 35 64 00.

Lýsingin er eisini at síggja á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

VAXT 4590010

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

STARVSLÝSING




## Lærlingur til útflutningsdeildina

**Starvið**
Talan er um spennandi starv í altjóða umhvørvi, har tú fært møguleikan at koma í shippinglæru og sleppur at arbeiða á skrivstovu hjá eini altjóða flutningsfyritøku.

**Førleikakrøv**
Tú hevur FHS-, HH- ella studentsprógv, sýnir dugnasemi og nærlagni, dámar at hava nógv at gera – stundum uttan fyri vanliga arbeiðstíð – og tú arbeiðir sjálvstøðugt eins væl og í toymi. Tú ert eisini fyrikomandi, dugir væl við fólki, og tú skrivar og talar føroyskt og enskt.

**Lønarviðurskifti og umsóknir**
Lønin verður ásett eftir sáttmálanum við S&K. Umsóknir við møguligum prógvum og skjølum um starvsroyndir skulu sendast til Faroe Ship, Eystara Bryggja, Postboks 47, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi 16. juli 2007. Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Allan N. Hansen, 23 90 23, allan@faroeship.fo.

REPROZ

FAROE SHIP
Góð sambond síðan 1919

Faroe Ship er flutningsfyritøka, sum saman við Eimskipafelag Íslands síðan 1. juli 2004 hevur myndað altjóða fyritøkuna Eimskip Group, ið er størsta flutningsfelag í Norðuratlanshavi, við egnum rutum til Evropa, USA, Baltalond og Ruslands.

Virkisøkið hjá Faroe Ship er innflutningur, útflutningur, innlendiskoyring, agency, vøruhotell og skundflutningsfyritøkan Faroe Express. Faroe Ship eigur fimm skip og hevur um 200 fólk í starvi. Í 2006 umsetti Faroe Ship fyri 300 milliónir krónur.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

## ÚTFERÐ Í STAKKIN



Um viðrar, verður skipað fyri útferð tann 22. juli kl. 14.00

Kostnaður: Vaksin: 300 kr.
Børn: 150 kr.

Tilmelding á telefon
265717 / 423565

Stakksnevndin í Tjørnuvík